# ALS til jóla



## SVØRT JÓL

*Hóast starvsfólkið í Als gera tað, tey eru ment, verða tað mong, sum ikki fáa arbeiðsloysisstuðul fyrrenn eftir jól, sigur Ernst Jacobsen, stjóri í Als*

**» Okkara partur skal ikki liggja eftir**

# Mugu gera sær ómak

Ernst Hansen sigur, at skulu arbeiðsleys gera sær vónir um at fáa sína umsókn um Als avgreidda so skjótt sum gjørligt, er tað av alstórum týdningi, at umsóknin er rætt útfylt.

Tí heitir hann á øll, sum missa arbeiðið, um at gera sær stóran ómak at fylla umsóknarbløðini rætt út.

Hann sigur, at hetta er kanska serliga umráðandi, nú Fiskavirking er farið á húsagang og Als fær fleiri hundrað umsóknir í einum rendi.

Í hesum sambandi heitir hann staðiliga á fólk um at venda sær til fakfelagið við ivaspurningum og kanska fáa fakfelagið at hjálpa til at fylla umsóknarblaðið út.

Stjórin í Als sigur, at tær umsóknir, sum eru rætt útfyltar, verða avgreiddar fyrst.

– Tær umsóknir, sum ikki eru rætt útfyltar, verða lagdar aftur um og ikki viðgjørdar, so at feilurin kann finnast, fyrrenn hinar eru avgreiddar, leggur hann afturat.

Als, fakfeløgini og Almannastovan hava seinastu dagarnar havt fundir við arbeiðsfólk kring landið og hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa tey arbeiðsleysu skrásett í Als og fyri at upplýsa tey um tey rættindi, tey hava.